# Óli P er fantastiskur

**– sigur Anfinnur Kallsberg, løgmaður, sum í vikuni fekk handaða nýggjastu Skemt-bókina av teknaranum sjálvum.**

TEKNIGÁVUR
*Jan Müller*

Ein av teimum, sum hevur verið mest frammi í tekningunum hjá Óla P í Sosialinum hesi 13 árini, er núverandi løgmaður Anfinnur Kallsberg. Vit síggja Anfinn longu í fyrstu tekningunum og sum komu út í bókini Skemt 89. Har er hann m.a. teknaður í grýtuni hjá teimum innføddu í Afrika, nú føroyingar royndu at fáa fótin fastan har. Anfinnur er aftur og aftur at síggja í strikunum hjá Óla P øll 90-ini. Og hóast heili 13 ár eru farin síðani fyrsta bókin kom út, so er Anfinnur framvegis á barrikadunum. Hesaferð á Tora Bora høvdunum í Afghanistan sum leiðari í talebananrepublikkini Føroyar saman við Høgna Hoydal og Sámal Peturi í Grund, har teir royna at verja borg.

Hóast settur í skák mát og speirikin í nógvum av tekningunum hjá teknaranum á Skála, so man løgmaður teljast millum størstu beundrarar av teknilistini hjá Óla P. -Óli er fantastiskur. Eg beundri, at hann kann úttrykkja so nógv við so fáum strikum. Tað situr so væl hjá honum, og altíð dugur hann væl at fáa poingið fram. Eg havi tað sera skemtiligt við hansara tekningum.

Anfinnur Kallsberg er á ongan hátt argur inn á teknaran. – Tá tú sum politikari velur at koma alment fram, so er hetta ein partur av tí veruleikanum.

– Nú eru tað tey, sum halda, at Óli P hevur verið í so nógv eftir fullveldinum og teimum, sum mynda hetta?

– Tað veit eg ikki. Tað mugu vit taka við. Onkur kanska heldur, at hann verður í so nógv úthongdur. Sjálvur havi eg so ongan trupulleika við tí.

Løgmaður heldur, at politikarar mugu góðtaka, at Óli P hevur sínar meiningar og metingar og letur tær koma til sjóndar, sum hann heldur vera rætt.

Hann heldur annars ikki, at teknarin hevur verið partískur ella friðhalgað nakran ávísan í sínum tekningum.

– Óli er suverenur í øllum, bæði til at tekna, til at seta orð á og ikki minst til at finna poengið. Hatta eru nøkur evni, sum eru bara heilt framúr. Sjálvur haldi eg ikki tað finnast teknarar við slíkum gávum nógva staðni. Hann er í serflokki. Tað eru gávur av hægsta klassa. Tær eru allar í topklassa, hóast tær eru ymiskar. Hann er sera fjølbroyttur og megnar at fanga hendingarnar á ein humoristiskan hátt og kortini fáa tær at vera so sigandi.

Óli hevur verið burtur frá eina løtu, og løgmaður sigur seg hava saknað hann. Tí tað fyrsta tú hyggur eftir, tá tú blaðar í bløðunum at vita, hvat hann nú hevur funnið uppá.



*Óli P vitjar í Tinganesi og handar Anfinni Kallsberg, løgmanni Skemt 01*
*Mynd: Jan*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag, sunnudagin og mánadagin::**
Lot til andøvsgul, okkurt skifti upp í stívt andøvsgul, fyri tað mesta av útsynningi og vestri. Skýggjað, támut og mjørki, tó einstakir sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Sum frálíður óstøðugt veður og eitt vet kaldari.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷8 |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | ÷5 |
| Halifax | 4 |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 6 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷11 |
| Berlin | ÷5 |
| Warzawa | ÷12 |
| Kiev | ÷14 |
| Bukarest | ÷3 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 4 |
| Róm | 9 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 10 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 26 |
| Sydney | – |
| New York | 12 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Hátrýst í ein landsynning úr Føroyum stendur mestsum í stað



Týsdagin viknar hátrýstið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/12 kl. $06^{00}$– 14/12 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 5,5°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/12 kl. $06^{00}$– 14/12 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í desember: 51,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

14. des.: Tendring
21. des.: Mánin longst frá jørðini
22. des.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. des | 06.44 | 19.15 | 05.44 | 18.15 | 05.59 | 18.30 | 08.44 | 21.15 | 09.44 | 22.15 | 04.59 | 17.30 | 03.59 | 16.30 | 06.59 | 19.30 | 07.59 | 20.30 | 06.29 | 19.00 | 07.44 | 20.15 |
| 16. des | 07.38 | 20.01 | 06.38 | 19.01 | 06.53 | 19.16 | 09.38 | 22.01 | 10.38 | 23.01 | 05.53 | 18.16 | 04.53 | 17.16 | 07.53 | 20.16 | 08.53 | 21.16 | 07.23 | 19.46 | 08.38 | 21.01 |
| 17. des | 08.26 | 20.52 | 07.26 | 19.52 | 07.41 | 20.07 | 10.26 | 22.52 | 11.26 | 23.52 | 06.41 | 19.07 | 05.41 | 18.07 | 08.41 | 21.07 | 09.41 | 22.07 | 08.11 | 20.37 | 09.26 | 21.52 |
| 18. des | 09.16 | 21.40 | 08.16 | 20.40 | 08.31 | 20.55 | 11.16 | 23.40 | — | 12.16 | 07.31 | 19.55 | 06.31 | 18.55 | 09.31 | 21.55 | 10.31 | 22.55 | 09.01 | 21.25 | 10.16 | 22.40 |


Brúdarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúdar- og brúdargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

Radio-verkstaður
Umvæling av:
Sjónvarpum
Videotólum
Hi-Fi
Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki
Fokus ELEKTRONIK


5 707265 100067 >